FISKIMÁLARÁÐIÐ

# Frágreiðing

# um løgtingslóg um sjófeingi

Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini

## Innihaldsyvirlit

Samsvarandi § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, við seinni broytingum, leggur landsstýrismaðurin, áðrenn 20. februar á hvørjum ári, frágreiðing fyri Løgtingið sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.

**1.** Løgtingslóg um sjófeingi. Hvat er sett í verk. Tey mest týðandi økini í tíðarskeiðinum fyri 1. februar 2022.
**2.** Hagtøl um fiskiveiðu.
**3.** Uppboðssølurættindi, menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir.
**4.** Veiðirættindi og avtalur um veiðirættindi.
**5.** Vørn. Støðulýsing innan fiskiveiðieftirlit.
**6.** Havstovan. Støðulýsing av mest týðandi fiskastovnunum.
**7.** Landsstýrismaðurin. Hvørjar ætlanir hevur hann í hyggju at fremja.

## 1. Løgtingslóg um sjófeingi

**Hvat er sett í verk. Tey mest týðandi økini í tíðarskeiðinum fyri 1. februar 2022.**

Løgtingslógin um sjófeingi kom í gildi 1. januar 2020. Summar skipanir fingu tó ikki virknað fyrr enn 1. januar 2022.

Á nýggjárinum 2022 var seinasta freist hjá rættindahavarum at knýta síni veiðirættindi at ávísum fiskifari. Tá var tvey ára tillagingartíðin runnin, og skipan við veiðiloyvum sett í verk. Við lógini um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) vórðu fiskirættindi loyst frá ávísa fiskifarinum.

Rættindahavarin kundi tá í prinsippinum velja, hvat fyri fiskifar hann brúkti síni veiðirættindi við. Hetta varð broytt við galdandi sjófeingislóg. Veiðirættindi skulu aftur knýtast at ávísum fiskifari. Ein tillagingartíð varð tó gjørd í lógini, men frá og við 2022 skulu rættindahavarar hava knýtt síni rættindi at ávísum fiskifari, sum fær veiðiloyvi.

Veiðiloyvið er eitt slag av góðkenning av ávísum fiskifari, sum eigarin fær til at reka vinnuligan fiskiskap. Sama fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvi. Veiðiloyvi verður ikki givið til ávísan fiskiskap. Tað verður gjørt við fiskiloyvinum, sum ásetir ítøkiligu veiðirættindini hjá einstaka fiskifarinum í einum fiskiári, og er avmarkað til tað árið.

Eftir lógini er ikki loyvt at reka vinnuligan fiskiskap uttan veiðiloyvi. Bólkur 5 er tó undantikin kravinum um veiðiloyvi fyri at fáa fiskiloyvi.

Lógin ásetir, at fyri at hava veiðiloyvi, skulu veiðirættindi (t.d. kvotur ella fiskidagar) vera knýtt at fiskifarinum. Sostatt ber ikki til at hava tóm veiðiloyvi. Eigarin av fiskifarinum skal vera heimahoyrandi í Føroyum og lúka treytirnar í lógini um eigaraviðurskifti. Fiskifarið skal somuleiðis vera skrásett í skipaskránni, tað skal hava siglingarloyvi, og tað skal ikki vera skrásett at hava verið partur í ólógligum, óskipaðum og ófráboðaðum fiskiskapi.

Veiðiloyvið er fyritreyt fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar ella egnar kvotur millum fiskifør. Í lógini eru eisini reglur um at flyta veiðiloyvi saman við øllum veiðirættindum millum fiskifør.

Veiðiloyvi verður latið eigara av ávísum fiskifari til tað ávísa fiskifarið. Verður fiskifarið selt, í tvingsilssølu ella vanligari sølu, fær nýggi eigarin veiðiloyvið, um hann lýkur treytirnar fyri at hava veiðiloyvi.

Ætlanin var, at brúksskyldan á veiðirættindum skuldi fáa virknað frá 1. januar 2022, men henda ætlan varð tó broytt soleiðis, at brúksskyldan er útsett til at koma í gildi 1. januar 2023.

**Atgongd at fiska og skipan av fiskiskapinum**
Fiskiskapurin hjá føroyskum fiskiførum í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv er skipaður við kunngerðum við heimild í løgtingslógini um sjófeingi.

Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at fiskifar hevur veiðiloyvi og fiskiloyvi. Fiskifør minni enn 15 tons nýtast tó ikki veiðiloyvi.

**Fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi**
Botnfiskaveiðan í føroyskum sjógvi er undir fiskidagaskipan. Áður vórðu fiskidagar ásettir í løgtingslógini, men frá og við 2021 ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð fiskidagatal fyri hvørt fiskiár. Hetta skal gerast eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum seta meginreglur um burðardygga stovnsrøkt.

**Egin árskvota**
Fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv og fiskiskapur eftir botnfiski í Barentshavinum og við Ísland er skipaður við egnum árskvotum. Í 2021 varð botnfiskiskapurin á Flemish Cap og í grønlendskum sjógvi eisini skipaður við egnum kvotum.

**Trolfiskiskapur við skiljirist**
Í september 2021 er krav sett um at nýta skiljirist í sambandi við fiskiskap við botntroli í føroyskum sjógvi. Endamálið við skiljiristini er at skilja ungfiskin frá, so bert tann størri fiskurin kemur aftur í trolposan. Samstundis eru ein partur av nøkrum stongdum leiðum norðanfyri latnar upp fyri trolfiskiskapi, um trolið hevur skiljirist.

## 2. Hagtøl um fiskiveiði

Hagtøl um fiskiveiði eru í fylgiskjali 1.

Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt upp veiðuna hjá føroyskum skipum í føroyskum sjógvi og avreiðingarvirðið í 2020 og 2021. Veiðan var tilsamans 407.744 tons í 2020 og 331.654 tons í 2021. Avreiðingarvirðið var tilsamans 1,7 mia. kr. í 2020 og 1,6 mia. kr. í 2021. (Talva 1.1)

Veiðan hjá føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv í 2020 og 2021 er eisini gjørd upp. Veiðan var tilsamans 250.996 tons í 2020 og 193.014 tons í 2021. (Talva 1.2)

Veiðan hjá útlendskum skipum í føroyskum sjógvi, sum eru úr teimum londum, ið Føroyar hava fiskiveiðiavtalu við, er gjørd upp fyri 2020 og 2021. Veiðan hjá útlendskum skipum var 343.112 tons í 2020 og 310.568 tons í 2021. (Talva 1.3)

## 3. Uppboðssølurættindi, menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

**Uppboðssølurættindi**
Samsvarandi ásetingum í avtiknu løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) vóru ávísir partar av føroysku heildarkvotunum av makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum seldir á uppboði í 2018 og í 2019 sum 3 og 8 ára rættindi.

Í § 9 í sjófeingislógini, sum kom í gildi 1. januar 2020, eru ásetingar um, undir hvørjum viðurskiftum hildið verður fram at kunna gagnnýta hesi rættindi. Ásett er eisini, at tá gildistíðin er runnin, verða uppboðssølurættindini útlutað sum egnar árskvotur. Hetta ber í sær, at við árslok 2021 fingu teir rættindahavarar, sum í 2018 og 2019 keyptu kvoturættindi á uppboði fyri 3 ár, lagt rættindini um til egnar árskvotur til egið fiskifar við veiðiloyvi.

Í Talvu 3.1 niðanfyri er sett upp, hvussu nógv av teimum ymisku heildarkvotunum eru umløgd uppboðssølurættindi og 8 ára kvoturættindi, sum eru keypt á uppboðssølum í 2018 og 2019. Tað, sum tilsamans er lagt um til egnar árskvotur 1. januar 2022, eru ávikavist 2,10% av heildarkvotunum av makreli og av norðhavssild, 3,40% av heildarkvotuni av svartkjafti og 1,72% av føroysku kvotunum av botnfiski í Barentshavinum.

| | **Umløgd rættindi** | **8 ára rættindi keypt á uppboði** | |
|---|---|---|---|
| **Fiskaslag/ár** | | **2018** | **2019** |
| Makrelur | 2,10% | 2,40% | 1,80% |
| Norðhavssild | 2,10% | 2,40% | 1,80% |
| Svartkjaftur | 3,40% | 4,00% | 2,80% |
| Botnfiskur í Barentshavinum | 1,72% | 2,44% | 1,80% |

Talva 3.1: Umløgd uppboðssølurættindi og 8 ára rættindi

**Menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir**
Sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) kundi ein partur av tøkari føroyskari kvotu vera settur av til at brúka sum liður í vinnuligum menningarætlanum kring landið. Latast kundu í mesta lagi 8,5% av samlaðu føroysku kvotuni av svartkjafti, makreli og norðhavssild.

Galdandi sjófeingislóg ásetir í § 14, at av tøku føroysku kvotunum av ávikavist svartkjafti, norðhavssild og makreli skulu 8,5% setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49.

Menningarkvotur, sum upprunaliga vórðu latnar sambært § 60 í lógini um fyrisiting av sjófeingi, og sum høvdu gildi 1. januar 2020, verða roknaðar av hesi nøgdini.

Sjófeingislógin § 10, stk. 3 heimilar landsstýrismanninum í gildistíðarskeiðinum eftir eftirmeting at taka avgerð um at leggja játtaðu menningarkvoturnar um til egnar kvotur, um hann metir, at tær eru virðisskapandi og burðardyggar. Eftir eftirmeting er avgerð tikin um, at av makreli, norðhavssild og svartkjafti eru ávikavist 7,29%, 7,38% og 7,79% av føroysku kvotunum løgd um til eginkvotur.

Rættindahavararnir kundu so til og við 31. desember 2021 annaðhvørt leggja kvotuna á egið fiskifar, sum tá fekk veiðiloyvi, um tað ikki hevði tað frammanundan, ella kvoturnar vórðu avhendaðar endaliga til eigara av fiskifari við veiðiloyvi, sbr. § 10, stk. 3 í lógini. Tað, sum ikki er lagt um, verður lutað út til vinnuligar royndir og verkætlanir samsvarandi § 14 í lógini.

Sjófeingislógin § 49 fevnir um vinnuligar royndir og verkætlanir. Greinin ásetir, at tær nøgdir av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sum eru ásettar í § 14 og § 15 og rættindum sambært § 17 verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Tvær lógarbroytingar viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum eru gjørdar í 2021. Við løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021 (løgtingsmál nr. 100/2020) var sjófeingislógin broytt soleiðis, at kvota til vinnuligar royndir og verkætlanir nú eisini fevnir um ítøkiligt keyp av fiskifari uttan veiðiloyvi. Og við løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 (løgtingsmál nr. 30/2021), eru ásetingar komnar inn í sjófeingislógina, sum geva landsstýrismanninum heimild til at umleggja kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir í tilsagnartíðarskeiðinum, um mett verður, at grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar annars hava verið hildnar. Harafturat hevur Løgtingið samtykt, at landsstýrismaðurin kann loyva, at óbrúktar nøgdir av makreli, norðhavssild og svartkjafti, latnar í 2021, íroknað nøgdir fluttar frá 2020, kunnu verða fluttar til at verða fiskaðar í 2022.

Vinnuligar royndir og verkætlanir kunnu býtast í tríggjar bólkar:

1) § 49, stk. 1, 1. pkt.: Verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskasløgunum.
2) § 49, stk. 1, 2. pkt.: Kvotur til ítøkiligt skipakeyp.
3) § 49, stk. 2: Ískoytiskvotur.

60% eru sett av til § 49, stk. 1. (Nýskapandi verkætlanir á landi og til skipakeyp)
40% eru sett av til § 49, stk. 2. (Ískoytiskvotur)

Í 2020 vórðu ískoytiskvotur av makreli og norðhavssild útlutaðar, í meðan restin varð útlutað í 2021.

Tann 11. juni 2021 lýsti Fiskimálaráðið alment eftir umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir. Møguleiki var hjá øllum at søkja, og tá freistin at søkja var úti 6. juli 2021, hevði Fiskimálaráðið fingið 51 umsóknir:

- 30 umsóknir um vinnuligar royndir og verkætlanir, sbrt. § 49, stk. 1. 1. pkt.
- 14 umsóknir um ítøkiligt skipakeyp, sbrt. § 49, stk. 1, 2. pkt.
- 7 umsóknir um ískoytiskvotu, sbrt. § 49, stk. 2.

Umsitingin viðgjørdi umsóknirnar og gjørdi eina frágreiðing við einum tilmæli til landsstýrismannin. Í frágreiðingini var ein stutt lýsing og meting av øllum umsóknunum. Landsstýrismaðurin tók avgerð um at tilluta kvotu til tríggjar verkætlanir á landi, sbrt. § 49, stk. 1, 1. pkt.

Tillutaðu kvoturnar í 2021 vóru hesar:

| **Felag** | **Makrelur** | **Norðhavssild** |
|---|---:|---:|
| P/F Vestmanna Fiskavirki | 1.300 | 1.000 |
| P/F Tavan | 0 | 1.000 |
| Sp/f 31.01.2011 | 500 | 500 |
| **Tons tilsamans** | **1.800** | **2.500** |

Talva 3.2: Tillutaðar kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir á landi

P/F Vestmanna Fiskavirki og P/F Tavan hava fingið endaliga tilsøgn. Sp/f 31.01.2011 fær væntandi endaliga tilsøgn á vári 2022, tá virkið eftir ætlan er klárt, Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur góðkent virkið til ætlaðu framleiðsluna, og virkið annars lýkur tær treytir, sum vóru settar í tilsøgnini.

Landsstýrismaðurin tók eisini avgerð um at tilluta kvotu til tvey ítøkilig skipakeyp, sbrt. § 49, stk. 1, 1. pkt.

Tillutaðu kvoturnar í 2021 vóru hesar:

| **Skip** | **Makrelur** | **Norðhavssild** | **Svartkjaftur** |
|---|---:|---:|---:|
| Sp/f Ango (m/s Ango) | 3.007 | 4.162 | 9.480 |
| Sp/f Gráastein (m/s Birita) | 3.007 | 4.162 | 9.480 |
| **Tons tilsamans** | **6.014** | **8.324** | **18.960** |

Talva 3.3: Tillutaðar kvotur til ítøkiligt skipakeyp

Bæði skipini komu til landið fyrst í november 2021 og fóru til fiskiskap fáar dagar seinni.

Viðvíkjandi ískoytiskvotu var bert talan um at tilluta kvotu av svartkjafti í 2021. Ískoytiskvoturnar av makreli og norðhavssild vóru játtaðar í 2020.

Ískoytiskvotan verður latin fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskiførum. Her er sostatt talan um styrk til teir skipaeigarar í vinnuni, ið ikki hava eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi rakstur av ávísum fiskifari. Tað er eisini ein treyt fyri at fáa ískoytiskvotu, at felagið ikki skal hava ræði á meira enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær. Teir stóru aktørarnir í vinnuni kunnu sostatt ikki fáa ískoytiskvotu.

Landsstýrismaðurin tók avgerð um at tilluta ískoytiskvotu av svartkjafti til fýra skip, sbrt. § 49, stk. 2. Talan var um skip, sum eisini høvdu fingið tillutað ískoytiskvotu av makreli og norðhavssild í 2020.

Niðanfyri sæst, hvørji skip hava fingið tillutað ískoytiskvotu, og hvat ískoytiskvotan var í 2021:

| Skip | Makrelur | Norðhavssild | Svartkjaftur |
|---|---:|---:|---:|
| m/s Jupiter | 899 | 1.443 | 3.160 |
| m/s Arctic Voyager | 899 | 1.443 | 3.160 |
| m/s Fram | 899 | 1.443 | 0 |
| m/s Vesturbúgvin | 358 | 0 | 0 |
| m/s Eysturbúgvin | 358 | 0 | 0 |
| m/s Katrin Jóhanna | 899 | 1.443 | 3.160 |
| m/s Hoyvík | 899 | 1.443 | 3.160 |
| **Tons tilsamans** | **5.208** | **7.215** | **12.640** |

Talva 3.4: Tillutaðar ískoytiskvotur

Allar játtaðu verkætlanirnar hava fingið tilsøgn um kvotu í eitt 5 ára tíðarskeið. Tó verður fiskiloyvi bert latið upp til eitt ár í senn og kann bert verða endurnýggjað, um treytirnar í tilsøgnini eru hildnar.

## 4. Veiðirættindi og avtalur um veiðirættindi

Føroyar hava, umframt livandi tilfeingið í føroyskum sjógvi, rættindi at veiða uttan fyri føroyskan sjógv.

Yvirlit yvir fiskiveiðiavtalur fyri 2021 og 2022 er í fylgiskjali 2.

Sínámillum fiskiveiðiavtalur eru fyri 2021 og 2022 gjørdar við Ísland, Grønland, Noreg og Russland. Avtalurnar fevna um, at Føroyar fáa rættindi at veiða kvotur hjá hesum londum í býti við kvotur í føroyskum sjógvi.

Samráðingar hava verið millum Føroyar og ES um fiskiveiðiavtalu fyri 2021, men tær bóru ikki á mál, og samráðingarnar um avtalu fyri 2022 eru ikki lidnar.

Í 2020 gjørdu Føroyar sáttmála við Bretland um fiskiskap. Talan er um ein karmsáttmála, og verður hann karmurin um alt fiskivinnusamstarv millum Føroyar og Bretland í komandi tíðum. Samráðingarnar við Bretland um fiskiveiðiavtalu fyri 2021 bóru ikki á mál.
Føroyar hava nú gjørt fiskiveiðiavtalu við Bretland fyri 2022. Føroyar kunnu fiska 750 tons av svartkalva, 1.000 tons av rossamakreli, 400 tons av hýsu og 830 tons av blálongu, longu og brosmu. Føroyar fáa harumframt rætt at fiska 186 tons av toski á Flemish Cap burtur av bretsku kvotuni. Í býti hevur Bretland fingið 2.250 tons av toski, hýsu og upsa, 225 tons av blálongu og longu, 75 tons av flatfiski, 10 tons av kongafiski og 500 tons av øðrum botnfiski.

Føroyar hava í 2021 og 2022 fingið rætt at fiska 5.600 tons av botnfiski í íslendskum sjógvi, harav upp til 2.400 tons av toski við Ísland. Fiskiskapurin eftir brosmu er avmarkaður til 400 tons.

Føroyska kvotan av lodnu í íslendskum sjógvi kann í mesta lagi vera 30.000 tons, men er treytað av heildarkvotuni, sum Ísland ásetir vegna tey trý strandarlondini – Ísland, Grønland og Noreg. Í býti hevur Ísland fingið 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi. Eisini er avtalað gjørd við Ísland um, at føroysk skip kunnu veiða svartkjaft og norðhavssild í íslendskum sjógvi, og at Ísland hevur atgongd at fiska íslendsku kvotuna av svartkjafti og norðhavssild í føroyskum sjógvi.

Føroysk fiskifør kunnu í 2022 veiða 350 tons av toski, 225 tons av svartkalva og 100 tons av brosmu í Eysturgrønlandi. Umframt hetta kunnu føroysk línuskip í 2022 veiða 2.150 tons av toski og 375 tons av brosmu í Eysturgrønlandi. Hetta eru somu kvotur sum í 2021. Føroyska kvotan av svartkalva í Vesturgrønlandi er 100 tons. Fiskifør kunnu royndarfiska eftir upp til 500 tons av krabba í Eysturgrønlandi. Í býti hevur Grønland í 2022 fingið sum kvotu 6.500 tons av norðhavssild og 14.700 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi, umframt atgongd at veiða í mesta lagi 4.076 tons av svartkjafti, sum er grønlendska kvotan av svartkjafti sambært samtyktini um fiskiskap eftir svartkjafti í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum í 2022.

Í norskum sjógvi í Norskahavinum og í Barentshavinum hava Føroyar í 2022 rætt at veiða 6.945 tons av toski, hýsu, upsa og øðrum botnfiski. Hetta eru somu kvotur sum fyri 2021. Í býti hevur Noreg í 2022 fingið 5.300 tons av botnfiski, sum skal fiskast við línu, og 6.600 tons av makreli í føroyskum sjógvi. Umframt kvotabýtið fáa føroysk skip í 2022 atgongd at fiska 3.790 tons av toski og 200 tons av hýsu, sum eru fingin til vega í sínámillum avtaluni millum Føroyar og Russland, í norskum sjógvi. Eisini er avtala gjørd við Noreg um, at norsk skip hava atgongd at veiða part av norsku svartkjaftakvotuni í føroyskum sjógvi. Semja var á sumri 2021 gjørd millum Føroyar og Noreg um makrelatgongd í 2021, har føroysk skip kunnu veiða 83.524 tons av makreli í norskum sjógvi. Somuleiðis kunnu norsk skip veiða sama tonsatal av makreli í føroyskum sjógvi.

Føroysku kvoturnar í russiskum sjógvi í Barentshavinum eru í 2022 16.699 tons av toski og hýsu, 900 tons av flatfiski og 2.500 tons av rækjum. Kvoturnar vóru í 2021 19.459 tons av toski og hýsu, 900 tons av flatfiski og 4.000 tons av rækjum. Í býti hevur Russland í 2022 fingið 75.000 tons av svartkjafti, 13.300 tons av makreli, 7.000 tons av sild og 500 tons av djúpvatnsfiski í føroyskum sjógvi, og atgongd til føroyskan sjógv at fiska part av russisku svartkjaftakvotuni í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum.

Føroyar hava eisini veiðirættindi, sum eru skipað sambært semjum í økisbundnum fiskiveiði-felagsskapum um fiskiskap í altjóða sjógvi.

NAFO (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í útnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum) skipar fiskiskapin uttan fyri kanadiska fiskimarkið. Fyri Føroyar hevur toskurin á Flemish Cap serligan áhuga, umframt fiskiskapur eftir svartkalva og kongafiski. Føroyska toskakvotan er 894 tons fyri 2022, í mun til 335 tons fyri 2021. Í 2022 er fiskiskapur eftir rækjum ikki loyvdur í NAFO-skipanarøkinum.

NEAFC (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum) skipar fiskiskapin í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum. Føroysk fiskifør kunnu royna í mesta lagi í 341 fiskidagar um árið eftir djúphavsfiski í NEAFC-øki og veiða upp til 150 tons av búrfiski. Veiða eftir kongafiski í Irmingerhavinum hevur ikki verið loyvd síðan 2021. Føroysk fiskiskip kundu í

2021 veiða burturav 16.540 tonsum av kongafiski í Norðurhavi, sum er felagskvota fyri NEAFC-sáttmálapartarnar. Ætlandi verður sama skipan sett í verk fyri 2022 innan fyri eitt kvotumark upp á 16.802 tons.

SPRFMO (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í Suðurkyrrahavinum) skipar fiskiskapin í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum. Føroyska kvotan av rossamakreli í økinum var 8.670 tons í 2021, og í 2022 er kvotan 9.978 tons. Føroyska kvotan í Suðurkyrrahavinum hevur í fleiri ár ligið ónýtt, og í 2019 var avtala gjørd við ES um at gera eitt býti, so kvotan varð flutt ES, sum afturfyri flutti Føroyum toskakvotu á Flemish Cap. Í 2020 og 2021 var avtala gjørd millum Føroyar og Kili um, at Føroyar lótu Kili føroysku kvotuna.

Fiskiskapur í fiskiverndarøkinum við Svalbard fer fram sambært Svalbardsáttmálanum. Føroyar hava fiskiskap eftir toski og øðrum botnfiski og rækjufiskiskap við Svalbard. Støðið á føroysku toskakvotuni við Svalbard er ásett eftir søguligari veiði hjá føroyskum fiskiførum í einum umboðandi tíðarskeiði, áðrenn fiskiverndarøkið við Svalbard var stovnsett í 1977.

Heildarkvotan hjá Føroyum í 2022 er 1.438 tons av toski í mun til 1.805 tons í 2021. Hýsa, svartkalvi og kongafiskur kunnu einans veiðast sum hjáveiða. Føroysk fiskiskip kunnu veiða rækjur við Svalbard í upp til 922 fiskidagar um árið.

Fyri teir ferðandi fiskastovnarnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild samráðast strandarlondini um skipan av fiskiskapinum. Føroyskur fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski fer fram bæði í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv.

Eftir at Bretland fór úr ES í 2020, eru samráðingar millum strandarlondini um uppsjóvarfiskiskapin víðkaðar við einum parti afturat. Londini hava funnið semju um mest loyvdu veiði av makreli, norðhavssild og svartkjafti fyri 2021 og 2022, sum er ásett samsvarandi ráðgevingini frá ICES (Altjóða ráðið fyri havrannsóknir), men ikki um býtið av heildarkvotuni. Tí hava Føroyar, eins og hini strandarlondini, ásett egnar kvotur av uppsjóvarfiski. Føroyska kvotan av makreli í 2021 var 167.048 tons, av svartkjafti 330.158 tons og av norðhavssild 143.553 tons. Føroysku kvoturnar í 2022 eru fyribils settar til: makrelur 50.000 tons, svartkjaftur 200.000 tons og norðhavssild 50.000 tons. Ósemjan um uppsjóvarfiskastovnarnar ger, at ongar avtalur eru gjørdar við ES og Bretland um sínámillum atgongd at fiska av strandarlandakvotunum inni hjá hvørjum øðrum, men Føroyar og Noreg gjørdu í 2021 slíka avtalu teirra millum.

## 5. Støðulýsing viðvíkjandi fiskiveiðieftirliti

**Fiskiveiðieftirlit – ein støðulýsing grundað á frágreiðing frá Vørn/Fiskiveiðieftirlitinum**
Fiskiveiðieftirlitið hevur sambært § 53 í løgtingslóg um sjófeingi eftirlit við, at reglurnar í lógini, og kunngerðir við heimild í lógini, verða hildnar. Samstundis hevur landsstýrismaðurin flutt fleiri uppgávur til Vørn at umsita og avgreiða.

Arbeiðsbyrðan hjá Vørn og Fiskiveiðieftirlitinum er økt munandi við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi og við sjófeingislógini. Játtanin er hækkað nakað seinastu árini. Hóast hetta metir Vørn, at stovninum tørvar munandi bøttar umstøður til fyrisiting og eftirlit, soleiðis at eftirlitið við lógini skal vera mett nøktandi.

Í samband við at stórar broytingar í sjófeingislógini, ið snúgva seg um “Atgongd og skifti,” komu í gildi 1. januar í 2022, gjørdist umsitingin og arbeiðsbyrðan nógv størri. Í størstan mun øktist trýstið á løgfrøðingarnar.

Eins og undanfarin ár eru heilt stórar nøgdir av fiski og fiskaúrdráttum landaðar, lagdar á goymslu og umskipaðar við bryggju í Føroyum.

Í 2020 umskipaðu útlendsk skip 334.000 tons til frystifarmaskip í føroyskum havnum. Harafturat løgdu útlendsk fiskiskip 28.600 tons á goymslu.

Í 2021 umskipaðu útlendsk fiskiskip 312.559 tons til frystifarmaskip í føroyskum havnum. Harafturat løgdu útlendsk fiskiskip 57.462 tons á goymslu.

Afturat hesum var nógvur fiskur landaður til virki í Føroyum í 2021. Í 2020 vórðu 553.519 tons landað í Føroyum, og í 2021 var nøgdin 540.363 tons. Størstu nøgdirnar eru uppsjóvarfiskur. Skoytast kann uppí, at føroysk skip landa nakað av fiski í útlondum. Her er talan um uppsjóvarfisk, serliga svartkjaft.

Frávik hevur verið givið frá kravinum um landingar í Føroyum. Trupulleikar hava verið at sleppa framat at landa svartkjaft til framleiðsluvirki ávísan part av árinum, og tí hevur verið loyvt at landa uttanlands.

Í 2020 vórðu 85.000 tons landað til útlendsk virki, meðan nøgdin í 2021 var 69.845 tons.

Tað, at lógarverkið hevur verið undir støðugum broytingum seinnu árini, og at politisku signalini benda á broytingar í framtíðini, ger, at tað er trupult at menna og framtíðartryggja KT-skipanir og mannagongdir, ið kunnu brúkast fleiri ár frameftir.

Tað, at bretar hava tikið seg úr ES, og at Bretland samstundis er vorðið partur, ið Vørn skal samstarva við, krevur eisini orku hjá Vørn - bæði av starvsfólki og fíggjarliga. Nevnast kann, at partarnir hava havt nakað av samskifti um tekniskar loysnir, men enn er ikki komið nakað ávegis. Vit vita kortini, at ein skipan við elektroniskum fráboðanum partanna millum skal vera virkin í hesum árinum. Her er talan um eina tekniska loysn, ið líkist teimum, ið Føroyar hava saman við Noregi, Russlandi og Íslandi. Sínámillum fundur um hesi viðurskifti verður tíðliga í vár.

Tá talan er um útflutning av fiski og fiskavørum til Bretlands, eru krøvini, at føroyskir myndugleikar vátta, at fiskiskapurin er farin fram samsvarandi galdandi reglum. Í tí sambandi skal Vørn útvega útflytaranum eina veiðiváttan “Catch Certificate”, ið skal latast myndugleikanum í Bretlandi.

Vørn samskifti við viðkomandi bretskar myndugleikar áðrenn ársskiftið 2020/21, og partarnir samdust um eina fyribils skipan. Nú eru ynski um at fáa eina varandi skipan, ið lýkur treytirnar, sum fara at koma í ár. Væntandi fer Vørn at hava eina meirútreiðslu upp á um 700.000 kr. av at seta hetta í verk.

Vørn vísir á, at samanumtikið eru krøvini til Fiskiveiðieftirlitið økt, sum hevur við sær, at fleiri starvsfólk eiga at verða sett.

**Eftirlit**
Kravið um, at øll veiða skal um føroyskan bryggjukant, økir sjálvsagt um virksemið í Føroyum og harvið eisini um kravið til eftirlitið á landi.

Føroyar hava í avtalu við Noreg og ES frá 2020 um eftirlit við uppsjóvarfiskastovnum bundið seg til at gera "full inspection" (fult eftirlit) av 5% av landingunum og 7,5% av nøgdini, sum verður landað av uppsjóvarfiski í Føroyum. "Full inspection" merkir m.a., at eftirlitsfólk skal vera til staðar alla tíðina, meðan landað verður. Hóast talið av eftirlitsfólkum á landi er økt við trimum fólkum seinasta árið, hevur Fiskiveiðieftirlitið torført við at liva upp til hetta í løtuni, og er tørvur á enn fleiri eftirlitsfólkum. 4 eftirlitsfólk eru í fulltíðarstarvi. Í løtuni er neyðugt at nýta manningar á Brimli og Tjaldrinum at gera kanningar á landi. Um fleiri eftirlitsfólk vórðu sett, kundu skipini savna seg um tað, tey eru ætlað til, nevniliga eftirlit til sjós.

Havandi í huga, at fleiri enn 852.000 tons vóru handfarin við bryggju í Føroyum í 2021, t.v.s. landað og umskipað, so er púra greitt, at vit megna ikki at halda ásetingarnar, ið vit hava bundið okkum til. Einar 6.000 landingar, frá størri og smærri skipum og bátum, vóru avgreiddar í føroyskum havnum í 2021.

Um vit til dømis hugsa um tey russisku skipini, sum javnan umskipa í frystifarmaskip, so eru onkur teirra blivin so stór, at tað tekur eina viku at tøma tey. Tey lasta eini 6.000 tons.

Tað, at Vørn hevur heimild at seta eygleiðarar umborð á føroysk skip, ið eru til ávísan fiskiskap, og at skipaeigarin ber útreiðslurnar, bøtir um møguleikarnar at reka fiskiveiðieftirlit til havs. Vørn kundi tó hugsað sær, at sama skipan var galdandi fyri øll føroysk skip uttan mun til fiskiskap.

Tá talan er um eftirlit til sjós, er virksemið avmarkað. Orsøkin er, at Tjaldrið einans er mannað helvtina av árinum. Tjaldrið var bygt í 1976, og tí slepst ikki undan tekniskum avbjóðingum. Tað hevur til tíðir verið trupult at fáa hendur á eykalutum; hetta ger, at skipið liggur nógv meira enn ætlað.

Vørn er av teirri fatan, at nýtt skip átti at verið útvegað ístaðin fyri Tjaldrið.

**Umsiting av fiskiloyvum**
Lógin um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) og síðani 2020 sjófeingislógin hava havt við sær, at tað eru nógv fleiri sløg av kvotum enn áður. Her kunnu m.a. nevnast eginkvotur, uppboðssølukvotur á 1, 3 og 8 ár, menningarkvotur, vinnuligar fiskiroyndir og ískoytiskvotur. Harafturat kunnu hesar kvotur eisini flytast ímillum ár, soleiðis at kvota, ið var keypt í 2018, hevur kunnað verið fiskað í 2019, og menningarkvota, latin í 2018, kundi fiskast í 2019 o.s.fr. Talan er um ymisk sløg av kvotum, sum ikki neyðturviliga eru fevndar av somu reglum viðvíkjandi avhending, veiðigjaldi, veiðiøki o.s.fr. Hetta setir stór krøv til umsitingina at halda skil á.

**Lóg um sjófeingi og dagføring av eldri kunngerðum**
Nakrar av eldru kunngerðunum eru dagførdar, men enn eru fleiri kunngerðir, ið áttu at verið dagførdar, so tær samsvara við nýggju lógina. Lógin tykist ikki nóg greið á fleiri økjum, og hetta ber í sær, at viðgerðin stundum gerst óneyðuga drúgv.

**Kanning av ognarviðurskiftum og miðsavnan**
Vørn hevur ábyrgd av at kanna ognarviðurskiftini hjá feløgum, ið reka, ella ætla at reka, vinnuligan fiskiskap í Føroyum, og at treytirnar um miðsavnan av veiðirættindum verða hildnar. Í hesum sambandi skulu allar broytingar í ognarviðurskiftunum í feløgum, ið reka vinnuligan fiskiskap, góðkennast av Vørn, áðrenn tær verða framdar. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði.

## 6. Støðulýsing av mest týðandi fiskastovnunum

**Fiskastovnar – ein støðulýsing grundað á frágreiðing frá Havstovuni**

**Vistskipanin á føroyska landgrunninum**
Vistskipanin á føroyska landgrunninum hevur seinastu umleið tíggju árini verið eyðkend av lítlum gróðri og smáum nøgdum av æti, so sum nebbasild. Í 2017 kom tó týðilig broyting í við nógvum gróðri, og samstundis gjørdist nøgdin av smáari nebbasild tann størsta í umleið 20 ár. Í 2018 og 2019 var gróðurin um miðal, men í 2020 og 2021 var hann vánaligur. Frá 2018 til 2021 var lítið til av smáari nebbasild.

**Toskur á Landgrunninum**
Toskastovnurin á Landgrunninum var søguliga lítil frá 2005 til 2016, har bæði vistfrøðilig viðurskifti og eitt ov høgt veiðitrýst gjørdu seg galdandi. Í 2017 var gróðurin á Landgrunninum góður, og nógv nebbasild kom undan tað árið. Vanliga plagar tilgongdin av smáfiski at vera góð slík ár – og tað sá tað eisini út til eitt skifti – men kortini gjørdist tilgongdin av toski í 2017-2019 lítil. Hetta fall saman við, at óvanliga nógvur vaksin toskur (slánur) var nær landi í 2018 og ikki minst í 2019.

Í 2020 og 2021 var støðan meira sum eitt vanligt ár. Veiðitrýstið er lækkað seinastu árini, men øktist í 2018 og var metstórt í 2019 og 2020. Veiðan í 2019 var 20.670 tons og í 2020 10.431 tons. Veiðan í 2021 er mett at vera 4.506 tons.

Gýtingarstovnurin av toski í byrjanini av 2021 var mettur til 15.240 tons, sum er minni enn lágmarkið á 29.226 tons, sum er ásett í umsitingarætlanini. Hetta gjørdi, at teir tillutaðu fiskidagarnir fyri Bólk 3-5 vórðu skornir við 5% fyri 2022. Lutfallið millum veiðu og fiskibaran stovn í 2021 var eisini oman fyri mørkini í umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin í byrjanini av 2022 varð mettur til 17 túsund tons og kemur væntandi at halda sær á sama støði komandi tvey árini, har veiðan væntandi verður minni enn 8 túsund tons um árið.

**Toskur á Føroyabanka**
Støðan hjá toskinum á Føroyabanka er óviss í løtuni. Magnus Heinason fekk nógv í mars 2020 og 2021, men lutfalsliga lítið í september 2020 og 2021. Línuskipini, sum gjørdu vísindaligar rannsóknir fyri Havstovuna á sumri 2020 og í 2021, fingu eisini sera lítið av toski. Havstovan hevur í tilmælinum fyri 2022 mælt til, at tað verður ein varisligur vinnuligur fiskiskapur á Føroyabanka í 2022, har línufør kunnu royna í tilsamans 200 fiskidagar. Harumframt er mælt til, at vísindaligar royndir við gørnum eftir havtasku halda fram.

**Hýsa undir Føroyum**
Hýsan undir Føroyum vísir nærum somu gongd sum toskurin á Landgrunninum. Tilgongdin í 2016-2018 var frægari enn vanligt. Veiðitrýstið er lækkað nakað seinastu árini og var í 2020 nakað oman fyri markið, sum ICES metir gevur størstu varandi veiðu, men kortini innan fyri mørkini í umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin við ársbyrjan í 2021 er mettur at vera 53 túsund tons, ið er væl meira enn lágmarkið á 22.843 tons, sum er lágmarkið sambært umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin í byrjanini av 2022 er mettur til umleið 68 túsund tons og væntast at minka komandi tvey árini, meðan veiðan væntast at verða 11-14 túsund tons um árið.

**Upsi undir Føroyum**
Upsi undir Føroyum hevur ikki verið fyri sama hóttafalli sum toskur og hýsa. Tilgongdin seinastu árini tykist at hava verið góð, og gýtingarstovnurin við ársbyrjan 2021 var mettur at vera 60 túsund tons, sum er oman fyri lágmarkið í umsitingarætlanini. Veiðitrýstið hevur í mong ár verið størri enn tað veiðitrýstið, sum gevur størstu varandi veiðu. Veiðan í 2021 í mun til fiskibaran stovn er mett at liggja niðan fyri lágmarkið í umsitingarætlanini. Hetta førdi við sær, at tillutaðu fiskidagarnir vórðu øktir við 5% í 2022 fyri Bólk 2 (trolarar). Tað er torført at meta um upsastovnin fram í tíðina, men ábendingar eru um, at gýtingarstovnurin og veiðan fara at økjast komandi tvey árini.

**Longa undir Føroyum**
Longa undir Føroyum var fyri fyrstu ferð stovnsmett í 2021 við neyvum tonsatølum. Gýtingar-stovnurin er øktur seinastu tíggju árini og var í 2021 mettur til 28 túsund tons. Veiðitrýstið er oman fyri burðardygga veiðitrýstið, sum ICES hevur ásett. Veiðan í 2022 er mett til 8 túsund tons við verandi veiðitrýsti og kemur væntandi at minka í 2023. Longa er formliga ikki ein partur av umsitingarætlanini fyri tosk, hýsu og upsa á føroyska landgrunninum, men verður fiskað sum hjáveiða. ICES hevur mælt til, at tað í mesta lagi verða fiskað 5.636 tons í 2022.

**Gulllaksur undir Føroyum og vestan fyri Skotland**
Gulllaksur undir Føroyum og vestan fyri Skotland var fyri fyrstu ferð stovnsmettur í 2021 við neyvum tonsatølum. Gýtingarstovnurin hevur verið støðugur í fleiri ár og var í 2021 mettur til 89 túsund tons. Veiðan í 2022 er mett til 13 túsund tons við verandi veiðitrýsti. Veiðitrýstið er niðan fyri burðardygga veiðitrýstið, sum ICES hevur ásett, og ICES mælti til eina veiðu í 2022 á 24.493 tons. Hetta er ein stór broyting í mun til ráðgevingina seinastu árini, og er orsakað av nýggju stovnsmetingini, sum nú er í neyvum tonsatølum. Veiðan eftir gulllaksi í føroyskum sjógvi er skipað við eini serstakari kvotaskipan, og hevur kvotan í fleiri ár verið 11.700 tons.

Ritið frá Havstovuni: “Tilmæli um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í 2022” sæst í fylgiskjali 3.

**ICES-tilmælið fyri uppsjóvarfisk 2022**
ICES hevur latið tilmæli um mest loyvdu veiðu fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2022. Mest loyvda veiðan lækkar fyri allar tríggjar stovnarnar av uppsjóvarfiski.

**Makrelur**
Tilmælið fyri makrel er 794.920 tons fyri 2022, sum er ein lækking á 7% frá í fjør. Makrelstovnurin var í vøkstri frá 2007 fram til 2014, men síðani tá hevur stovnurin verið í minking. Stovnsmetingin vísir, at gýtingarstovnurin er 3,5 mió. tons, ið er oman fyri tað, sum sambært umsitingarætlanini er markið fyri, nær neyðugt er at vísa varsemi. Tilgongdin hevur verið góð síðani 2001.

Veiðitrýstið er minkað síðani 2003 og lá fram til 2021 undir hámarkinum fyri, nær mett verður, at veiðan er burðardygg (Fmsy = 0.26). Við nógv øktu veiðuni í 2021 verður tó mett, at veiðitrýstið fer upp á 0,35 í ár, sum er væl oman fyri hámarksvirðið.

Strandarlondini ES, Noreg og Føroyar bóðu í 2019 ICES um at meta um eina nýggja langtíðar-umsitingarætlan fyri makrel. ICES hevur latið strandarlondunum metingina, men enn hava strandarlondini ikki viðgjørt svarið frá ICES.

**Svartkjaftur**
Tilmælið fyri svartkjaft er 752.736 tons fyri 2022, sum er ein lækking á 19% frá í fjør. Gýtingarstovnurin er mettur at vera 3,4 mió. tons, og er minkaður støðugt síðani 2018. Tó er hann oman fyri støddina, har tað sambært umsitingarætlanini er neyðugt at vísa varsemi. Árgangirnir 2013-2015 vóru góðir, men tilgongdin í tíðarskeiðinum 2017-2019 var vánalig, og tí minkar stovnurin komandi árini. Tekin eru tó um, at 2020-árgangurin helst verður yvir miðal.

Veiðitrýstið hevur síðani 2014 ligið oman fyri hámarkið fyri, nær mett verður, at veiðan er burðardygg (Fmsy = 0.32). Í fjør var veiðitrýstið 0,46, og tað verður mett at fara upp um 0,50 í ár.

**Norðhavssild**
Tilmælið fyri norðhavssild er 598.588 tons fyri 2022, sum er ein lækking á 8%. Gýtingarstovnurin hevur verið í støðugari minking frá 2008 til 2020, men í ár er góði 2016-árgangurin vorðin búgvin, soleiðis at gýtingarstovnurin av norðhavssild kvinkaði eitt vet uppeftir og er í dag 3,9 mió. tons, sum er oman fyri markið í umsitingarætlanini fyri, nær varsemi skal vísast (3,2 mió. tons). Tilgongdin eftir 2016 er mett at vera vánalig.

Veiðitrýstið er vaksið síðani 2015 og er nú 0,19, sum er oman fyri hámarkið fyri, nær varsemi skal vísast.

Talva 6.1 niðanfyri vísir ICES-tilmælini um mest loyvdu burðardygga veiðu (tons) fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2022 og broytingarnar í tilmælunum frá 2021 til 2022.

| Fiskastovnur | Tilmæli 2021 | **Tilmæli 2022** | Broyting í tilmæli frá 2021 til 2022 |
|---|---:|---:|:---:|
| Makrelur | 852.284 | **794.920** | -7% |
| Svartkjaftur | 929.292 | **752.736** | -19% |
| Norðhavssild | 651.033 | **598.588** | -8% |

Talva 6.1: ICES-tilmæli fyri uppsjóvarfisk 2022

Vegna ósemju um býtið av stovnunum hevur fiskiskapurin eftir makreli, svartkjafti og norðhavssild seinastu árini ligið um 20-25% oman fyri vísindaligu ráðgevingina. Í ár kann makrelfiskiskapurin væntast at fara 40% upp um tilmæltu veiðuna, um øll londini fiska alt, tey hava fráboðað.

## 7. Hvørjar ætlanir eru í hyggju at fremja

Í frágreiðingini um fyrisiting av sjófeingi, sum var løgd fram á heysti 2019, varð víst á, hvat er ásett í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu. Fleiri av hesum málum eru sett í verk í sambandi við, at Løgtingið samtykti nýggja sjófeingislóg, sum fekk gildi 1. januar 2020. Málið við nýggju lógini er at fáa eina fiskivinnuskipan, ið elvir til búskaparliga, vinnuliga, lívfrøðiliga og umhvørvisliga burðardygd, og sum hevur mest møguliga virðisøking og menning í Føroyum.

Í hesum sambandi skal t.d. vera nevnt, at við nýggju sjófeingislógini eru kvoturættindini og fiskidagarættindini (veiðirættindini) tryggjað fyri 12 ár, skipanin við uppboðssølu av kvotum er tikin av, og farið er undir at leggja keypt rættindi um til egnar kvotur. Eisini eru menningarkvotur eftirmettar og umlagdar til egnar kvotur.

Hildið verður fram á somu kós við at leggja felagskvotur um til egnar kvotur. Hetta verður gjørt við støði í tí fatan, at besta gagnnýtsla fæst úr tilfeinginum, um loyvini verða útskrivað sum eginkvotur. Skjøtul var settur á hetta, tá makrelfiskiskapurin var skipaður fyri 2020. Í sambandi við at skipa fiskiskapin í 2021 er hildið fram við at leggja felagskvotur um til eginkvotur – kvotur av norðhavssild eru skipaðar sum eginkvotur, og fiskiskapurin eftir botnfiski á Flemish Cap og í grønlendskum sjógvi er skipaður við eginkvotum. Í 2022 er ætlanin, at føroysku rættindini eftir rækjum við Svalbard verða skipað sum egnir fiskidagar, og at fiskiskapurin eftir rækjum í russiskum sjógvi verður skipaður við eginkvotum.

Spurningurin um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir hevur verið eitt afturvendandi mál í sambandi við at seta ta skipan í verk, sum var samtykt við sjófeingislógini. Men nú er loksins vón fyri, at ein varandi skipan fæst í lag. Við hesi skipan kunnu kvotur, ið eru ætlaðar til vinnuligar royndir og verkætlanir, umframt at verða brúktar til slíkar royndir, eisini verða latnar sum ískoytiskvotur sum grundarlag undir at bøta um verandi rakstur av tí einstaka skipinum, og sum nakað nýtt sum kvotur í sambandi við at útvega sær skip – tó ikki í sambandi við annað skip fyri eitt verandi. Til tess at gera skipanina at kunna fáa kvotu í sambandi við skipakeyp smidligari, verður samstundis skipað fyri, at tað ikki er treyt, at hetta skip hevur veiðiloyvi.

Á hesum grundarlagi er í verandi sjófeingislóg ein partur av kvotunum av svartkjafti, makreli og norðhavssild settur av til vinnuligar royndir og verkætlanir á ymiskan hátt at stuðla undir vinnuliga menning og nýskapan av føroyskari fiskivinnu.

Royndarfiskiskapur er ein týðandi partur av at menna føroyska fiskivinnu. Sambært grein 50 í sjófeingislógini kann landsstýrismaðurin uttan mun til galdandi avmarkingar eftir løgtingslógini, eftir ummæli frá Havstovuni, lata fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi, ella við fiskiloyvi í bólki 5, sambært § 18, stk. 1, nr. 6, serstakt fiskiloyvi til royndarfiskiskap.

Seinastu árini hevur verið vaksandi áhugi fyri at gagnnýta stóra tilfeingið av reyðæti, sum er í føroyskum sjógvi, á vinnuligum grundarlagi. Í Føroyum hevur áhugin serliga snúð seg um at hava fiskiskap í Bankarennuni, har stórar mongdir av sjógvi við nógvum reyðæti streyma á heysti og

vetri. Mett verður, at eini 7 mió. tons av reyðæti árliga reka henda vegin. Mest sannlíkt er, at tað allarmesta av reyðætinum, sum streymar ígjøgnum Bankarennuna, doyr. Havstovan hevur gjørt kanningar har á leiðini og hevur mett, at grundarlag er fyri at fara undir royndarfiskiskap eftir reyðæti á vetri at staðfesta, um grundarlag er fyri at gagnnýta reyðæti í føroyskum sjógvi vinnuliga í burðardyggum nøgdum.

Gjøgnum skipanina við Fiskivinnuroyndum hevur Fiskimálaráðið játtað fíggjarligan stuðul til ávísar vinnuligar royndir og til gransking viðvíkjandi reyðæti.

Tað er við hesum í huga, at Fiskimálaráðið hevur givið 5 tilsagnir um royndarloyvi til fiskiskap eftir reyðæti í Bankarennuni. Okkurt skip hevur gjørt nakrar royndir, men enn er gongd ikki komin á royndarfiskiskapin.

Mesopelagisk fiskasløg er eitt annað tilfeingi í føroyskum sjógvi, sum ikki verður gagnnýtt, sum er. Her er talan um fiskasløg, sum liva uppi í sjónum, sum til dømis prikkafiskur og lakssild, og kunnu fáast við smámeskaðum troli. Nakrar royndir eru áður gjørdar, men hildu ikki fram. Hugsanin er, at royndirnar verða tiknar uppaftur.

Fiskivinnuroyndir er ein týdningarmikil skipan at stuðla menning av fiskivinnu á sjógvi og landi. Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum. Játtanin til Fiskivinnuroyndir hevur seinastu árini heldur verið skerd enn hækkað. Hetta er ein skeiv gongd. Tí er hugsanin, at játtanin kann verða hækkað og veruliga gerast ein stuðul undir menning av føroyskari fiskivinnu.

Seinastu árini hevur fiskiskapur ikki verið loyvdur á Føroyabanka, tí vísindaliga metingin er, at serliga toskastovnurin er illa fyri. Havstovan hevur skipað fyri vísindaligum rannsóknum í 2020 og 2021, og í tilmælinum fyri 2022 hevur Havstovan mælt til, at tað verður ein varisligur vinnuligur fiskiskapur á Føroyabanka í 2022. Ætlanin er í høvuðsheitum at skipa fiskiskapin á Føroyabanka í samsvari við tilmælið frá Havstovuni.

Lógaruppskot um broyting í sjófeingislógini er sent til hoyringar. Lógaruppskotið verður lagt fram fyri at gera tvær tillagingar í sjófeingislógini. Onnur er at nágreina ásetingarnar um, hvat skal roknast við í nøgdirnar, tá ið kvotur av uppsjóvarfiski til vinnuligar royndir og verkætlanir verða lagdar um til egnar árskvotur. Hin snýr seg um at broyta lógina soleiðis, at um eigari av fiskifari, sum hevur fingið játtað ískoytiskvotu, skiftir hetta fiskifarið út, skal tað í ávísum førum bera til at flyta ískoytiskvotuna á nýggja fiskifarið.

Til heystar verður møguliga eitt lógaruppskot við broytingum í sjófeingislógini lagt fram, har ymiskar tillagingar verða gjørdar, so lógin er greiðari at virka undir og at umsita. Ein møgulig broyting kann vera, hvussu umlagdar menningarkvotur skulu teljast við í miðsavningarregluni fyri uppsjóvarfiskasløgini.

Sjófeingislógin ásetir, at brúksskyldan á veiðirættindum kemur í gildi 1. januar 2023, men hon fær ikki virknað fyrr enn frá ársbyrjan 2024. Uppskot til broytingar í ásetingunum um brúksskylduna vóru partur av lógaruppskoti, ið varð viðgjørt á Løgtingi í 2021 (løgtingsmál 30/2021). Í álitinum frá Vinnunevndini er minnilutin (samgonguumboðini) samdur við meirilutanum um, at brúksskyldan

verður tikin burtur úr tí lógaruppskotinum og viðgjørd nærri í 2022, og heitir samstundis á landsstýrismannin um at lata vinnuna vera við í tilgongdini.

Hesa niðurstøðuna hjá Vinnunevndini hevur landsstýrismaðurin tikið til eftirtektar og fer at taka stig til at viðgera spurningin um brúksskyldu nærri, við tí í hyggju at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið í heyst.

Ósemja millum strandarlondini um, hvussu tilmæltu heildarkvoturnar skulu býtast millum londini, hevur elvt til, at nógv meir enn vísindaliga tilmælt verður fiskað. Hetta er ein óheppin gongd og hóttir eina burðardygga gagnnýtslu av hesum ríka tilfeingi. Landsstýrismaðurin hevur tí sett sær fyri, at ferð verður sett á arbeiðið fram ímóti at fáa semju millum strandarlondini.

Løgmaður setti í februar 2021 Vakstrarforum. Havbólkurin hevur latið úr hondum frágreiðingina: “Havið og framtíðin – Tilmæli um burðardyggan virðisvøkstur úr havinum”, har fleiri átøk verða tikin fram at skunda undir virðisvøkstur úr havinum. Sum eitt langtíðarmál verður sett, at útflutningsvirðið á føroyskum sjófeingi skal vaksa úr 7,7 upp í 11 milliardir krónur áðrenn 2030. Landsstýrismaðurin fer at viðgera tilmælini í frágreiðingini, meta um og gera møgulig uppskot um, hvussu málini best kunnu verða rokkin.

Fiskimálaráðið, 17. februar 2022

**Árni Skaale (sign.)**
*landsstýrismaður*